LØGTINGIÐ

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

Trivnaðarnevndin

02.11.2020
Lm.nr. 31/2020 RS/ód
(at tilskila í svari)

Spurningar frá Trivnaðarnevndini til landsstýrismannin í almannamálum, viðvíkjandi løgtingsmáli 31/2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk (Broytt tillagað starv, nýggj javning o.a.)

Av tí, at málið ikki hevur verið til hoyringar, er neyðugt at fáa lýst málið nærri við nøkrum skrivligum spurningum.

1. Kann landsstýrismaðurin vísa á við nøkrum dømum, hvussu fólk í tillagaðum starvi, sum skifta starv, verða ávirkað lønarliga. Gott um hetta kann lýsast í dømum fyri ymiskar lønarbólkar.
2. Er tað rætt skilt, at broytingin fyri fólk, sum eru í skipanini nú er, at hægsta lønarískoyti lækkar við 2.100 kr. um mánaðin?
3. Landsstýrismaðurin hevur víst á, at ongin í tillagaðum starvi skal koma undir eina arbeiðaraløn (undantikið niðursetta tíð). Somuleiðis hevur landsstýrismaðurin í Løgtinginum upplýst, at ongin í verandi skipan kemur undir eina arbeiðaraløn, men at nýggj fólk, sum koma í skipanina, kunnu fara niður um arbeiðaraløna. Í lógaruppskotinum stendur í viðmerkingunum um nýskipanina við uppskotinum, at persónar í tillagaðum starvi eru tryggjað í minsta lagi eina fulla arbeiðaraløn. Her virkar ikki, sum samsvar er millum tað, sum er sagt, og tað sum stendur. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um øll í verandi skipan fáa eina arbeiðaraløn? Og um øll nýggj eisini fáa eina arbeiðaraløn?
   Hyggja vit eftir skrivum til nevndina, so sær tað út til, at fólk fara niður um arbeiðaraløna í nýggju skipanini. Serliga har arbeiðsførleikin er lágur. Hvørjar viðmerkingar hevur landsstýrismaðurin til hetta?

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

LOGTING.FO

4. Hvørjar viðmerkingar hevur landsstýrismaðurin til skrivið frá Fakfelagsráðnum? Serliga verður hugsað um tað, sum Fakfelagsráðið vísir á um, at fólk fara frá sáttmálaløn, og at tað serliga fer at raka tey, sum hava minstan arbeiðsførleika.
5. Hvørjar viðmerkingar hevur landsstýrismaðurin til skrivið, nevndin hevur fingið frá Michael Feldballe?
6. Metir landsstýrismaðurin tað vera í samsvari við ST-sáttmálan um rættindi hjá fólki, sum bera brek, at lønin lækkar, og at tann parturin, landið kompenserar fyri í lønaríkoyti, ikki longur verður sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag - alt eftir hvør útbúgvingin og starvsheitið er? Og metir landsstýrismaðurin, at ætlaða lógarbroytingin er í samsvari við aðalmálini í ST-sáttmálanum um, at londini m.a. virka fyri javnseting av borgarum, og burturbeining av øllum mismuni millum fólk vegna brek?
7. Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir á, at lønarparturin hjá arbeiðsgevara er eftir sáttmála, og at man nú vil broyta skipanina soleiðis, at lønaríkoytisparturin hjá landinum ikki verður eftir sáttmála, og at hetta er óheppið. Hvørjar viðmerkingar hevur landsstýrismaðurin til hetta?
8. Metir landsstýrismaðurin tað verða rætt, at fólk við skerdum førleika ikki longur fáa sáttmálaløn og løn eftir útbúgving?
9. Vit kunnu taka dømi við einum lærara, sum er í skipanini í dag, og einum lærara, sum kemur inn eftir nýggju skipanini. Hvussu verður munurin millum hesar starvsfelagar í krónum og oyrum? Vit kunnu siga við støði í t.d 30% og 50% arbeiðsførleika á sama arbeiðsplássi? Sama dømi við øðrum fakbólkum hevði eisini verið gott hjá nevndini at fingið. T.d fyri fólk á fiskavirki, fyri fólk í Starvsmannafelagnum, Heilsuhjálparafelagnum o.ø.
10. Um uppskotið verður samtykt, fara vit so at uppliva, at fólk fara at fáa ymiska løn fyri sama arbeiði? T.d. tvey fólk við sama skerda arbeiðsførleika fáa ymiska løn fyri sama arbeiði?

Vegna nevndarformannin

Rannvá Sólheim
nevndarskrivari